# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg fari ikki til Wien, uttan at eg verði eysturríkskur ríkiskanslari, og sjálvandi havi eg ein møguleika*

*Jørg Haider*

# Víðgongdir jødar kunnu forkoma Ísrael

**Í seinastuni hava ókendir menn søkt at palestinum og ísraelskum hermonnum á Vestara Áarbakka. Demokratiið er í vanda, sigur Ehud Olmert**

Ísraelska demokratiið er í vanda. Tað sigur fráfarandi forsætisráðharrin, Ehud Olmert, sum vísir á, at ta seinastu tíðina hava fleiri álop verið á ísraelskar trygdarhermenn og palestinar á Vestara Áarbakka.

Ísraelsku myndugleikarnir bera ótta fyri, at víðgongdir, høgrasinnaðir jødar hava stovnað ein felagsskap á Vestara Áarbakka. Myndugleikarnir hava illgruna um, at felagsskapurin hevur skipað fyri fleiri álopum, og millum annað kannar løgreglan, um tað vóru limir í hesum felagsskapinum, sum royndu at beina fyri professaranum og friðarstríðsmanninum Zeev Sternhell seinasta hósdag.

Ísraelsku fjølmiðlarnir hava umrøtt fleiri álop á Vestara Áarbakka í seinastuni. Løgreglan sigur, at ágangurin hevur vundið upp á seg, og at hon hevur skrásett fleiri tilburðir, har jødar hava gjørt seg inn á palestinar ella palestinskar ognir. Harumframt hava jødiskir niðursetumenn lopið á ísraelskar trygdarhermenn í økinum, sigur løgreglan.

Fleiri viðmerkjarar í Ísrael samanbera gongdina við virksemið hjá einari jødiskari undirgrundarrørslu, sum var virkin seinast í sjeytiárunum og fyrst í áttatiárunum. Limir í rørsluni myrdu palestinskar studentar á einum islamskum háskúla í Hebron og skipaðu fyri fleiri bumbuatsóknum at palestinskum borgarstjórum á Vestara Áarbakka. Tveir av limunum í rørsluni blivu tiknir og fingu lívlanga fongsulsrevsing, men sluppu úr fongslinum nøkur ár seinni.

### Skotin 20 ferðir

Jerusalem Post skrivar, at ísraelska løgreglan kannar í løtuni eina heimasíðu, har onkur hevur hótt við at beina fyri Ehud Olmert, forsætisráðharra, øðrum politikarum og dómarum í ísraelska hægstarætti.

Ísraelsku bløðini skriva, at víðgongdir niðursetumenn hava hert ágangin ímóti palestinska fólkinum á Vestara Áarbakka, og at víðgongdir rabbinar styðja teir, sum skipa fyri ágangin-um. Seinasta leygardag bleiv ein 18 ára gomul palestinsk genta funnin deyð nærhendis býnum Nablus. Kanningar vístu, at hon var rakt av umleið 20 skotum., og eygnavitni greiddu frá, at tað vóru niðursetumenn úr einari bygd í grannalagnum, sum høvdu beint fyri henni. Hetta er annað morðið av hesum slagnum hendan mánaðin.

Blaðið Ha'arets skrivar, at fyrra hálvár í ár skrásetti ísraelska løgreglan 429 álop á palestinar og palestinskar ognir. Alt árið í fjør vóru álopini 551 í tali, skrivar blaðið.



*Teir víðgongdu jødarnir hótta ísraelska demokratiið, sigur Ehud Olmert*

*Mynd: Polfoto*

# Russar skulu byggja kjarnorkuverk í Venesuela

**Russland og Venesuela hava sett sær fyri at økja samstarvið, og tað fellur ikki í góða jørð í Washington**



*Vladimir Putin og Hugo Chávez kanna eitt modell av einum Tupolev TU-160 flogfari*

*Mynd: AFP*

Forsetin í Venesuela, Hugo Chávez, hevur enn eina ferð víst, at hann gevur sær ikki stórvegis far um, hvat amerikanska stjórnin heldur um uttanríkispolitikk hansara. Fyri 14 døgum síðani kunngjørdi hann, at Russland og Venesuela skulu hava felags herflotavenjing í vetur, og nú hevur hann tosað við russar um at byggja eitt kjarnorkuverk í Venesuela.

- Russland er sinnað at hjálpa Venesuela við at menna kjarnorku til friðarlig endamál, og vit hava longu sett eina nevnd at arbeiða við málinum, segði Hugo Chávez eftir ein fund við russiska forsætisráðharran, Vladimir Putin, um vikuskiftið.

Politiskir eygleiðarar siga, at Russland hevur víst munandi størri áhuga fyri samstarvinum við Venesuela síðani Georgia-kreppuna. Teir siga, at avgerðin at senda herskip til Venesuela á venjingarferð er uttan iva eitt svar uppá, at USA sendi herskip til Georgia við neyðhjálp.

Tey seinastu trý árini hevur Venesuela keypt stríðsflogfør, tyrlur og riflur úr Russlandi fyri meiri enn fýra milliardir krónur, skrivar Reuters.

## STUTT SAGT

### Sviar smugla minni

Tann høgi benzinprísurin kann vera ein orsøk til, at sviar smugla ikki so nógvan rúsandi løð nú sum fyrr. Í hvussu er skrivar blaðið Dagens Nyheter, at sviar smugladu 35 prosent minni av brennivín og øðrum rúsandi løði fyrra hálvár í ár enn somu mánaðir í fjør. Tølini vísa, at sviar smuglaði heili 66 prosent minni av brennivíni og 16 prosent minni enn øli. Harafturímóti smugladu teir tvey prosent meiri av víni enn fyrra hálvár í fjør.

Mats Ramstedt, sum kannar brennivín- og rúsevnanýtsluna hjá svium, heldur ikki, at tann minkaða smuglingin er eitt tekin um, at sviar drekka minni brennivín nú enn fyrr, tí tølini hjá einkarsøluni vísa, at hon hevur selt meiri higar til í ár enn í 2007.

Mats Ramstedt sigur við Dagens Nyheter, at vanliga plaga sviar at fara til Týsklands við bili at keypa rúsdrekka, men tann høgi benzinprísurin kann hava gjørt, at tað er ikki so spennandi longur, sigur hann. Ein onnur orsøk kann vera, at tollvaldið hevur lagt størri dent á at avdúka smuglarar.

### Cadbury kallar sukurlátu aftur

Søtmetisfyritøkan Cadbury hevur kallað aftur ellivu sløg av sukurlátu, sum eru framleiddar á verksmiðjuni, sum fyritøkan hevur í Kina. Avgerðin er tikin í samráð við heilsumyndugleikarnar í Hongkong og hevur samband við, at eitt slag mjólkarpulvur er funnið í Kina.

Kanningar av mjólkarpulvurinum vístu, at evnið melamin var blandað uppí, men tað er ikki greitt, um kanningar hjá Cadbury hava staðfest melamin í sukurlátu, sum er gjørd á verksmiðju felagsins, sum er í Beijing.

Tann eitraða mjólkin hevur kostað fýra kinesiskum smábørnum lívið, og umleið 54.000 børn hava fingið nýrastein ella aðrar trupulleikar av teirri eitraðu mjólkini, skrivar BBC.